# Njótið og verðið glað

**Sambært bókini Njótingarsami heilin kann meir njóting geva okkum eitt betri lívi. Nú er bókin komin á føroyskum**

TÝÐING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nógv umrødda bókin »Njótingarsami heilin« er júst komin á føroyskum í týðing eftir Paula Nielsen.

Í Njótingarsama heilanum lýsir Morten Kringelbach, professari, hvussu granskingí njóting og trá kann vera ein lykil til at skilja, hvussu heilin á okkum virkar, og hvussu bøtt kan verða um lívsdygdina.

### Støði í heilaskanningum

Morten Kringelbach hevur serligan áhuga í, hvussu stóra ávirkan sansaligar og sosialar njótingar hava á okkara lív, og hvussu stóra ávirkan vantandi njóting hevur á tunglyndi, støðuga pínu og etingarólag.

Njótingarsami heilin hevur støði í granskingini hjá Morten Kringelbach og lýsir seinastu framstigini í heilavísindini. Nýggir heilaskanningarhættir hava gjørt tað gjørligt at máta virksemið í livandi menniskjaheilanum.

Morten Kringelbach hevur við hesi tøkni fingið greiðu á, hvar, nær og hvussu kenslur, njóting og trá verða til í heilanum. Betri fatan av hesum mekanismum fer vónandi sum frá líður at hjálpa teimum mongu, sum vanta njóting í lívinum, og at geva størri lívsgleði og heilsu til fólkið.

Njótingarsami heilin er ikki ein sjálvhjálparbók, men ein bók fyri almenningin, har rithøvundin, listamaðurin og vísindamaðurin á sera greiðan og skemtiligan hátt oysir av sínum stóra innliti í heilan. Bókin gevur okkum nakað at hugsa um. Vit kenna okkum aftur í henni og kunnu læra at fara betur um lívið

Pauli Nielsen hevur umsett bókina í samstarvi við Morten Kringelbach, so hvørt sum hann hevur skrivað hana. Bókin er nýliga komin út á donskum og enskum og varð hon tá ummæld á Grams síðunum her í blaðnum.

Føroyska útgávan er komin á forlagnum Ítriv.




*Út frá nýggjum mátum at skanna heilan lýsir bókin "Njótingarsami heilin", hvussu kenslur, njóting og trá verða til í heilanum*

Sony Ericsson G502i

Jólagáva til undirhald

Fartelefon við flest øllum hentleikum, so sum 3G, 2MP myndatóli, Bluetooth, 32MB minni, møguleika fyri at byggja minni út við M2 korti, FM-útvarpi og TrackID music recognition. Battarí: 10 tímar talutíð og 340 tímar standby. Phonearena gav hesari telefonini 8 stig av 10 møguligum í test tann 05-06-2008.

Les meira á vodafone.fo
Vit eru eisini til tænastu á 202020.



kr. 1395
Vanligur prísur 1.595,-

Løtan er tín

vodafone

# Ævintýraferðin sum bók

**Ævintýraferðin, sum vit kenna best frá palli á ólavsøku er nú komin út, sum bók**

DRAMA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ein av útgávunum til jóla, sum serliga vendir sær til yngru lesararnar, er Ævintýraferðin, sum Dánjal Kaggadingding Kaggadum og Búi Sibbidibbidimdimd ubadabadam eru upphavsmenn til.

Handan løgnu nøvini fjala seg Dánjal á Neystabø og Búi Dam, sum seinastu fimm árini hava framført tónleikasjónleikir fyri og við børnum.

### Ein ræðuligur morgun

Higartil hava vit upplivað Ævintýraferðina á palli á ólavsøku, ella tá teir báðir hava vitjað dagstovnar og fólkaskúlar umframt á fløgum, sum teir hava givið út. Nú er so tann fyrsta bókin í Ævintýraferðini komin. Tað er søgan um drongin, sum gloymdi hvussu mann spælir.

Pól elskar at spæla. Hann spælir alt millum himmal og jørð. Men ein morgunin hendir nakað ræðuligt. Pól vaknar og finnur útav, at hann hevur púra gloymt, hvussu mann spælir. Uttanfyri hittir hann vinmannin Janus, og so byrjar søgan...

Bókin telur 30 blaðsíður, og hevur onki aldursmark. Bókin hóskar seg væl at lesa upp fyri smáum børnum, eins og børn í skúlaaldri kunnu lesa hana sjálvi, tí tekstirnir eru lættir at lesa., og søgan er góð. Sjáldsomu og sera flottu tekningar í Drongurin, sum gloymdi hvussu mann spælir, hevur Janus á Húsagarði teknað. Myndirnar eru livandi og sermerktar á tann hátt, at hvørja ferð, tú hyggur at teimum, sært tú okkurt nýtt, sum dregur teg enn longur inn í hendan ævintýraheim.




*Fyrsta bókin í Ævintýraferðini hjá Danjál á Neystabø og Búa Dam hóskar seg væl at lesa upp fyri børnum*




Sig tað á jólum ...

ASUS FARTELDA

Ein supersnøgg telda við 15,4" skíggja
15,4" WXGA – Intel Celeron C220 – 128 MB grafikkram – 1 GB RAM – 160 GB harðdisk – DVD/RW – 802.11 bgn – Vista Basic – Kortlesara

3.995,-

Tilboðini eru at fáa í Telebúðunum kring landið og eru galdandi til jóla :-)

FØROYA TELE

SENDISTOVAN